## Minningarorð um pápa mín
# Sivard Høj
## f. 3. juli 1933 – d. 15. apríl 2002



Mánamorgun tann 15. apríl kl. 7.30 ringdi telefonin heima hjá mær. Eftirsum tað var so tíðliga um morgunin, hugsaði eg, um tað mundi vera úr Føroyum. Tí at babba hevði verið sjúkur eina tíð.

Og so var. Tað var mamma, og røddin á henni var ikki tann sama, sum hon plagdi at vera. Hon segði, at hon hevði ikki góð boð at bera mær. Hon segði, at nú var babba farin.

Sjálvt um babba hevði verið sjúkur eina tíð, kom tað dátt við, at hann ikki var her meira. Dugdi ikki at skilja tað, at hann ikki skuldi vera millum okkum meira.

Tankarnir gingu aftur til síðsta summar, tá eg og Stefan vóru í Føroyum. Babba var ikki heima, tá vit komu heim at vitja, hann var úti við Morning Star, og minnist meg rætt, kom hann aftur einar 3-4 dagar, eftir at vit vóru komin. Eg hevði gingið túr við soninum hjá mær, Stefan, tá eg fór inn á gólvið hjá Súsannu systur míni. Eg bleiv rættiliga bilsin, tá eg sá babba sita har við køksborðið. Hevði ikki lagt til merkis, at Morning Star var komin. Hann reisti seg upp og gekk ímóti mær, og so tók hann um meg og ynskti mær vælkomnari heim, man datt næstan burtur í føvninginum hjá honum. Tað føldist so væl. Vit byrjaðu at tosa beinanvegin saman. Tá eg so spurdi hann, hvussu leingi hann bleiv heima, svaraði hann, at hann ikki ætlaði avstað aftur, fyrr enn eg var farin niðuraftur. Hann helt, at tað var so langt ímillum, at man sást.

Ein dagin fóru babba, Stefan og eg niðan í hagan. Mær hevur altíð dámt væl at gingið í haganum saman við babba, tað er nakað, eg havi gjørt nógv av sum barn. Vit gingu næstan niðan á Skálabrekkuna, tað var so gott veður tann dagin, og hann fortaldi um fuglarnar, áirnar, og um hvussu allir steinarnir itu. Tað var áhugavert at lurta eftir honum, og hann dugdi so væl at fortelja um alt. Babba hevur eisini gingið nógv í haganum, tað var fast hjá honum, tá hann kom frá fiskarínum, at fara ein gongutúr niðan í hagan, og tað blivu eisini nakrir gangitúrar, áðrenn hann skuldi avstað aftur. Men hagin var eisini babbasa størsta interessa. Meg minnist eisini, at tá vit systkin vóru yngri, tóku mamma og babba okkum ofta niðan í hagan serliga um summarið. Tá plagdu vit at fara ein góðan sólskinsdag og ganga niðan á Fjall, tað gjørdu vit fast ígjøgnum fleiri ár.

Summarið gekk skjótt, og vit skuldu aftur til Danmarkar. Vit skuldu sigla við Norrönu, og tað var babba, sum fylgdi okkum til Havnar. Vit vóru við Ternuni til Havnar, og tað bleiv ikki tosað so nógv. Tað er altíð so tungt, tá man skal fara avstað aftur. Vit komu til Havnar og fóru beinanvegin yvir til Norrönu. Tá vit høvdu kekkað inn, kom tíðin til at siga farvæl. Babba ynskti mær og Stefan ein góðan túr niður aftur við vón um, at vit komu at síggjast skjótt aftur. Vit tóku um hvør annan, so fóru vit umborð.

Tá vit høvdu koyrt bagasjuna inn á kamarið, fóru vit upp á dekkið at vita, um vit sóu babba standa niðri á keiini, og tað tók bert ein minutt ella tveir, til vit sóu hann, og vit byrjaðu at veittra til hann, og hann veittraði aftur. Tá Norröna legði frá bryggju, stóð babba har á keiini og veittraði til okkara, og vit veittraðu til hann, til Norröna tók og snaraði og byrjaði at sigla úteftir, og vit mistu hvør annan úr eygsjón.

Tá vit komu niður aftur, fór babba aftur at sigla, og eg tosaði ikki so nógv við hann teir næstu mánaðirnar. Tað var so sjáldan, at hann var heima, tá man ringdi, men man spurdi altíð eftir honum, og hvussu tað gekk við fiskarínum hjá honum.

Babba hevði verið sjómaður alla sína tíð, fór til skips fyrstu ferð bert 14 ára gamal. Tað var hansara lív at vera á sjónum, og har treivst hann væl. Babba hevur siglt við nógvum skipum gjøgnum tíðina, í seinastuni við Morning Star. Har var hann, tá hann bleiv sjúkur, og teir sigldu inn við honum. Tá babba kom fyri seg á hospitalinum, tosaði hann bert um, at nú var fiskaríið liðugt. Tað dámdi honum nokk ikki so væl. Babba bleiv 67 fyri hálvumøðrum ári síðani og kundi verið farin á pensjón, men tað vildi hann slettis ikki. Hann tímdi ikki bara at ganga við hús og einki gera, og so var, at babba helt fram at sigla.

Tann 15. desember um morgunin ringdi mamma og segði, at babba var farin á sjúkrahúsið í Klaksvík. Hann hevði fingið blóðpropp í hjartað, men hevði fingið tað betri. Tað vóru eini ring boð at fáa. Tað var, sum alt steðgaði upp. Eg hugsaði um at missa babba, tað kundi eg slettis ikki fyristilla mær. Havi altíð sæð babba sum ein sterkan mann og havi aldri trúð, at hann kundi doyð. Kanska rættiliga naivt, tí tað er tann vegur, vit øll skulu ígjøgnum. Tá babba hevði ligið á Klaksvíkar sjúkrahúsi í nakrar dagar, bleiv hann fluttur til Landssjúkrahúsið í Havnini, tí tey høvdu betri tól.

Tær næstu vikurnar vóru ógvuliga upp og niður, og tað stóð ofta um lív. Tað vóru harðar vikur, havi ongantíð gráti so nógv sum tá. Hvørja ferð telefonin ringdi, visti man ikki, hvat fyri boð man fekk.

Tað bleiv avgjørt, at tá alt bleiv stabilt, skuldi babba flytast niður á Ríkissjúkrahúsið og fáa by-pass operatión, av tí at hjartaklappurin hevði tikið skaða og lak illa.

Og tann 8. januar var tað so mikið stabilt, at babba bleiv fluttur niður við leiguflogfari hjá Atlantic. Mamma, Diddi og Sigvør vóru við. Tey komu fyrst til mín við bagasjuni, síðan fóru vit øll saman við gubba, mammubeiggja mínum, sum var komin úr Rødby Havn inn til Keypmannahavnar at taka ímóti, inn á Ríkissjúkrahúsið. Tað var hart at skula síggja babba liggja har í respirator. Eg tordi ikki at fara heilt inn til hann. Tað tók nakrar dagar at manna seg upp til at standa við síðuna á honum og venja seg at síggja hann liggja so hjálparleysan.

Síðan gekk hálvurtriði mánaður, har tað gekk upp og niður, og læknarnir søgdu, at teir kundu ikki geva babba eina by-pass operatión. Av tí at babba hevði tapt seg so nógv, hevði hann mist so nógvar kreftir. Hann mátti koma til kreftir áðrenn eina operatión, annars fór hann ikki at klára operatiónina. Tá babba var komin fyri seg so nøkulunda, bleiv tað avgjørt, at hann skuldi flytast uppaftur til Føroyar og koma til kreftir har heima. Tað var hann so spentur uppá, og hann tosaði bara um at síggja øll aftur har heima. Tann 27. mars kom dagurin, at farast skuldi upp aftur. Tað var ringt at skula siga farvæl kvøldið fyri við babba. Eg hugsaði, um tað mundi vera síðstu ferð, eg sá babba á lívi. Eg royndi at skúgva tað út úr tankanum, men tað var eitt kensluborið avskeð.

Túrurin til Føroya gekk væl, og babba bleiv fluttur aftur til Havnar á sjúkrahúsið. Síðan babba kom heim aftur, var tað meira afturgongd enn framgongd, og bert hálvatriðju viku aftan á heimkomu sína, tann 15. apríl, andaðist babba.

Tað er ringt at skilja, at babba ikki er her meir. Man roynir at fara víðari, og Stefan hevur spurt so ofta, hví abbi skuldi doyggja. Man hevur einki svar, men Gud vildi nokk hava babba heim nú, hansara tíð var at enda komin.

Eg havi verið glað fyri, at babba hevur verið niðri. Sjálvt um hann alla tíðina hevur ligið á sjúkrahúsinum og ongantíð kundi koma heim til mín, sum hann ynskti so nógv, so hevur tað upp á ein máta verið lættari fyri meg at koma víðari. Man var so ofta á hospitalinum, sum man kundi, og vitjaði hann, og man sá, hvussu skiftandi tað gekk við honum.

Til systkinini hjá mær, Diddi, Beiggi, Súsanna og Turid. Eg veit, hvat tit fara ígjøgnum. At missa babba, tað er nógv og eisini ein stórur saknur. Má Harrin signa og styrkja tykkum øll gjøgnum hesa sváru tíð.

Men ringast er hjá tær, mamma, tú sum hevur mist tín mann. Tú vart ein góður stuðul hjá babba. Ígjøgnum hansara fýra mánaða sjúkralegu vart tú hvønn tann einasta dag og sat uppi yvir honum, meðan hann lá. Tað hevur verið hart fyri teg at sæð babba liggja so sjúkan, men tú kláraði teg so væl, og eg veit, at babba var glaður fyri, at tú vart har hjá honum. Má Harrin signa og styrkja teg gjøgnum hesa sváru tíð, tú skalt ígjøgnum.

Babba, eg takki tær fyri alt, tú hevur verið fyri meg og míni. Tú hevur verið ein góður pápi. Eg komi at sakna teg ógvuliga nógv. Tað verður ringt at koma til Føroyar at vitja, og tú ikki verður har, men eg veit, at vit ein dag skulu síggjast aftur, og tað er gott at vita. Men tað besta við tær var, sum teg takki tær mest fyri, er, at tú mín pápi var.

Eg vil hervið lýsa frið yvir minnið um babba.

**Paula**

## Eyguni fyllast
## Ognað Karlo Joensen

sorgin
hevur mong andlit

gráturin,
sum ein knútur
tí tú, vinur okkara
ert ikki meir

meiningsloysið,
tí tú ikki komst aftur

vreiðin,
um alt, ið ongantíð verður,
sum tað var

angistin,
fyri kalda dýpinum,
tóma stólinum,
og fyri at svíkja tá á stendur

takksemi,
tí vit kundu kalla teg vin
tú, sum gav
umsorgan

sorgblíða gleði,
um túrarnar
við tær, sum dugdi at siga frá
og at tiga

saknur,
tað kennist salt á varrunum

grøv tín rúmar nógv
tár

**Jóngerð og Kissa**

†

Við hesum verður kunngjørt at elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Agnes Mortensen**
ættað úr Keypmannahavn búsitandi í Tórshavn

andaðist á Áargarði á Sandi leygardagin 8. juni, 81 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Fyri tey avvarðandi*

**Malan, Frants, Snorri, Andrass og Guttorm**



# KJ-Hydraulik fingið samstarvsfelagar í Skotlandi



*Ólavur Asafson, næsti frá vinstru her í samrøðu við bretsku oljuvinnuna. Okkurt fer at spyrjast burtur úr seinastu føroysku oljuvitjanini í Bretlandi, sum Ólvaru metir at vera ta bestu og mest ítøkiliga hann hevur verið á*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

OLJUVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Aberdeen, Sosialurin:** Meðan kyrrindi eru í vónunum um olja í nóg stórum mongdum til at útvinnast finnst í føroysku undirgrundini og vit gita, men ikki rættuliga vita, um tað verður egg ella ungi, so eru tað føroyskar fyritøkur, sum uttan mun til føroyska olju vilja hava ein bita av oljuvinnuni aðrastaðni.

Fyri 14 døgum síðan var eitt ferðalag við umboðum fyri fimm føroyskum fyritøkum á arbeiðsferð í Aberdeen. Oljufelagið Agip hevði valt hesar fyritøkur millum aðrar føroyskar og endamálið var at finna samstarvspartnarar innan undirveitarar í bretsku oljuvinnuni, soleiðis at føroyingar kundu bjóða sína kunnan fram.

- Av teimum mongu oljuferðum eg havi verið, er hendan tann klárt besta og mest ítøkiliga. Vit hava fingið samband við fyritøkur í Aberdeen, sum eru áhugaðar og sum hava tørv á okkum. Hetta hevur verið hugaligt. Eg haldi eisini, at tað at Agip, sum eitt kent oljufelag, hevur valt føroyskar fyritøkur út, hevur givið nakað heilt annað, enn tá vit hava verið umboðaðir á undanfarnum ferðum við kanska meira almennum stovnum sum vertum. Her hevur alt verið meira ítøkiligt, vit hava ikki bara verið mettir sum bóndir úr Føroyum, men sum javnbjóðis partnarar. Eg havi havt samband aftur við tvær fyritøkur og eisini við framleiðslupallin Tiffany,sum vit vitjaðu, og verður arbeitt nóg miðvíst, so kann arbeiði á føroyskar hendur spyrjast burtur úr hesi ferð, sigur ÓIavur Asafsson, stjóri á KJ-Hydraulik, ein fyritøku í Eysturoynni í stórari menning,, og sum hevur hug at veksa.

### Tørva arbeiðsmegi

- Vit ætla at bjóða okkum fram innan hydraulik, mekanikk og elektronik og her hava vit førleika. Tann einasti trupulleikin í løtuni er, at so nógv arbeiði er í Føroyum í dag, at ringt er at fáa fólk. Og her renna vit okkum aftur á ein trupulleika, tí í ringum tíðum hevur tú ikki orku til at royna nýggjar leiðir, so vit mugu smíða nú, sigur Ólavur Asafsson, stjóri.

- Vit fingu at vita í Aberdeen, at tað er sum at leita eftir gulli, at finna fólk við rætta førleikanum at arbeiða innan oljuvinnuna. Hjá oljuvinnuni er tað nógv meira ein spurningur um at finna fyritøkur, sum kunnu gera arbeiðið, enn spurningurin um pengar, og tað skuldi gjørt tað hugaligt hjá okkum í arbeiðinum at fótin innan oljuvinnuna í Bretlandi, sigur hann.

- Vit hava fótin í báðum legum, vit hava fólk, sum hevur skil fyri elektronikki og vit hava eisini fólk, sum hevur skil fyri hydraulikki og mekanikk,i og á báðum hesum økjum er stórur tørvur fyri arbeiðsmegi í bretsku oljuvinnuni. Nógvir eystureuropæarar gera hetta arbeiði í dag, serliga polakkar, sigur Ólavur Asafsson.

Fyritøkurnar, sum vitjaðu í Aberdeen, sita nú og eftirmeta ferðina og halda sambandið við líka. Nógvir spurningar eru at taka støðu til og teir týdningarmestu eru skattviðurskiftini og lønarlagið. Onkur av fyritøkunum hevur longu nú drúgvar royndir at arbeiða uttanfyri landoddarnar og hinar brynja seg út, at fáa eitt annað bein at standa á enn føroyska marknaðin.

## Puslispælið



